# Fólk frøast um Eyvind



*Sunneva Dalsgaard, dóttir Eyvind og fyriskipari av framsýningini, saman við nøkrum av systkinabørnum sínum. Eyvind Dalsgaard átti átta brøður*

**List, gomul minni og familja vóru í hásæti, tá framsýning við verkum eftir Eyvind Dalsgaard læt upp**

FRAMSÝNING
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*
*Myndir: Elin og Heri á Rógvi*

Dalsgaard slagið er sermerkt fólkaslag. Ein stórur partur av familjuni býr í dag aðrastaðni enn í Skálavík, men lyndi og sermerkini síggjast tó aftur. Leygardagin læt framsýning eftir Eyvind Dalsgaard upp í Smiðjuni í Lítluvík, har Dalsgaard kundi seta sína dám á. Og tað var ikki uttan orsøk.

Í 1952 doyði Eyvind Dalsgaard. Eitt spennandi fyribrigdi í føroysku listasøguni. Hann gjørdist bert 47 ára gamal, men hansara listaverk liva eftir. Hann vaks upp millum átta brøður í Skálavík, men flutti seinni til Danmarkar í lestrarørindum og síðani til Havnar við konu sínari Sigrid, sum hann fekk trý børn saman við.

Eyvind var fjøllbroyttur listamaður. Á framsýningini eru bæði tekningar, bringumyndir og smærri listaverk.

Sunneva Dalsgaard, dóttir Eyvind, hevur tikið stig til framsýningina. Tað var ein ógvuliga glað og væl nøgd Sunneva, sum kundi bjóða fólkum vælkomnum leygardagin.

Framsýningin hevur opið hvønn dag frá kl. 14 til 18 í Smiðjuni í Lítluvík.



*Ein Valdemar og annar. Abbasonurin við síðuna av bringumyndina av Valdemar Lútzen, sum Eyvind Dalsgaard hevur gjørt*



*Listaverkið úr Royðugrótið hevur staðið alla sína tíð í garðinum á Mølini í Skálavík. Tíðin hevur slitið listaverkið nakað*



*Eyvind Dalsgaard var fjøllbroyttur listamaðr*

WWW.SMYRIL-LINE.COM



FÓLK TIL MÓTTØKUNA Á
NORRÖNU

**Søkt verður eftir fólki til móttøkuna umborð á Norrönu.**

Smyril Line sóknast eftir fólki við royndum á høgum altjóða tænastustigi. Tað er eitt krav, at umsøkjararnir duga væl danskt og enskt í skrift og talu og annars hava kunnleika til hini norðurlendsku málini umframt týskt ella onnur fremmandamál. Tað er ein treyt, at móttøkufólkini hava góð samstarvsevni og duga at arbeiða undir trýsti uttan at missa yvirlitið.

**Heilsuprógv fyri sjófólk krevst**
(Ikki eldri enn 2 ár).

Tað er ein fyrimunur at hava trygdarskeið
(Ikki eldri enn 5 ár).

Smyril Line bjóðar størv í einum umhvørvi við góðum møguleikum fyri persónligari og fakligari menning.

Umsóknir og CV skulu vera okkum í hendi innan 1. apríl 2005 og skulu sendast til:

**Smyril Line**
**Manningardeildin**
**Jónas Broncks gøta 37**
**Postboks 370**
**FO-110 Tórshavn**

**Ella við telduposti til:**
**crew@smyril-line.fo**

J. Broncks gøta 37 · Postboks 370
FO-110 Tórshavn · Tlf: 34 59 00
Fax: 34 59 50 · office@smyril-line.fo